# Bilar

Nr. 194 • hósdagur • 10. oktober 2002 • 76. árg.

# Framkomin HMF krani frá Trukk & Maskin Servicu



*John William Old frá Trukk & Maskin Servica er her saman við Martin Frederiksberg, ið er komin at avheinta bilin fyri sonin, Rasmus Frederiksberg. Martin hevði sjálvur lastbilar fyrr, men nú hevur sonurin tikið yvir*

**Fyritøkan hjá John William Old, Trukk & Maskin Servica, læt í seinastu viku ein nýggjan stóran HMF krana til ein Scania lastbil hjá Rasmus Frederiksberg á Strondum**

KRANI
*Magnus Gunnarsson*

Fyri góðum tveimum árum síðan byrjaði John William Old fyri seg sjálvan við fyritøkuni Trukk & Maskin Servica á Heygnum Mikla í Havn. Fyritøkan hevur serkunnleika innan hydraulikk, gaffiltrukkar og kranar. Johan William hevur fleiri ára royndir á hesum øki. Hann er umboðsmaður fyri HMF (Højbjerg Maskinfabrik A/S) í Føroyum, ið selja lyftir til kassavognar, skiftilastskipanir til lastbilar, kranar, ífestisvognar og páhangsvognar til lastbilar.

Højbjerg Maskinfabrik bleiv stovnað í 1945, men framleðslan byrjaði av álvara í 1947. Teir høvdu stóra framleiðslu av vippulastum til lastbilar í 50-unum. Í dag útflyta teir til meira enn 50 lond í Skandinavia, Evropa, Norðuramerika, Fjareysturi og Australia. Tað er í høvuðsheitum kranar og lyftir til baklúkur teir útflyta.

Í seinastu viku bleiv ein nýggjur framkomin HMF krani settur á ein lastbil hjá Rasmus Frederiksberg á Strondum. Talan var um ein HMF krana ið kann lyfta umleið10 tons. Hesin kranin hevur ein serligan ventil á útskjótarastemplinum, ið ger at tað tekur einans 39 sekund at koyra kranan út 16,9 metrar. Hetta er ein stórur fyrimunur tá arbeitt verður við grabba. Tað tók brøðrunum, Petur og John William Old, eina góða viku at taka tann gamla kranan av og seta ein nýggjan á aftur.

## HMF Serie 2820

| | |
|---|---|
| Lyftiorka | 28 tm |
| Hydraulisk armlongd | 16,9 metrar |
| Total armlongd | 26,2 metrar |
| Frástøðan millum stuðulsbeinini | 6,2 metrar |
| Søluumboð | Trukk& Maskin Servica<br>v/ John William Old<br>á Heygnum Mikla<br>Tlf. 311725 / 223243<br>jwtrukk@kallnet.fo |

# Opel Signum – diskretur luksusbilur

**Ein nýggjur Opel luksusbilur er á veg. Talan er um sera væl útgjørda luksusbilin Signum, ið líkist eini blanding av hatchback og stationcar. Bilurin er á støðd við Vectra, men hevur 13 cm longri aksilfrástøðu**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Opel royna seg nú við annarleiðis luksusbilum sum hesum nýggja Signum. Hóast bilurin ikki sær so stórur út, er hann sera rúmligur. Tað at hann hevur 13 cm longri aksilfrástøðu enn Vectra, ger at tey ferðandi á baksetrinum hava beinpláss í limousine stíli. Í standard útgávuni er Signum ein luksusbilur, men hann fæst t.d við Travel Assistant, ið er ein boks ímillum bæði baksetrini. Í hesi boksini eru tvey borð at taka út, ein køliboks og pláss til DVD anlegg. Í loftinum eru lesilampur og rúm at legga lutir frá sær í. Signum fæst við trimum motorum, einum 2,2 litur bensinmotori og beinleiðis innsprænning, einum 2,0 litur turbo motori við 175 hk og einum V6 commonrail turbodieselmotori við 177 hk.



*Opel Signum líkist eini blanding av hatchback og stationcar*



# VW New Beetle Cabriolet



*VW New Beetle Cabriolet. Bilurin minnir ikki sørt um cabriolet útgávuna av gomlu Bobluni*



*Bilurin hevur innbygdar automatiskar styrtboylar*

**Volkswagen New Beetle Cabriolet verður frumsýndur á Detroit Motor Show í januar 2003. Bilurin kemur á danska marknaðin í einaferð í vár, so tey sum ynskja sær ein Beetle Cabriolet til næsta summar, kunnu seta bilin á ein ynskilista**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Fyrst var tað VW Type 1, síðan bleiv tað Golf Cabriolet. Nú kemur so New Beetle Cabriolet. Við hesum bilinum vísir Volkswagen hvussu tryggur, komfortabul og praktiskur ein slíkur bilur kann verða. Bilurin er til fýra persónar við innbygdum automatiskum styrtboylum. Galesjan er gjørd úr góðum tilfari, sum ger at bilurin ikki er kaldur at koyra í um veturin. Í eini handavending kann kalesjan leggjast niður aftanfyri baksetrið. Motorurin er ein 2,0 litur bensin við 115 hk. Bilurin kann leverast við einum nýggjum 6-trins tiptronic girkassa.

# Samsung og Renault samstarva um bilaframleiðslu



*Renault Samsung Motors eru nýliga komnir á marknaðin við hesum Samsung 525V*

**Samsung kenna vit best frá radiotólum, fløguspælarum og øðrum elektroniskum tólum. Eisini hava vit sæð Samsung brøytir á ymiskum arbeiðsplássum kring landið. Samsung er ein stór Suðurkoreansk ídnaðarkonsern sum eisini framleiðir bilar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tá stóra suðurkoreanska Samsung konsernin fór undir bilaframleiðslu, var tað í samstarvi við Nissan. Men eftir stórar fíggjarligar trupulleikar í Fjareystri bleiv tað fyri tveimum árum síðan, Renault sum yvirtók bilaframleiðsluna.

Renault Samsung Motors, sum nýggja fyritøkan eitur klárar seg sera væl og gevur eitt gott yvirskot. Renault er fyrsta evropeiska fyritøkan sum samstarvar við suðurkoreanarnar um bilaframleiðslu. Fyritøkan hevur egna granskingar og menningarmiðstøð í útkantinum av Seul. Samsung gera bilar við motorum frá 1,5 litur til 2,6 V6 motorar.

## Honda Mobilo Spike



Fýrakantaðir bilar er farmtíðin. Við Mobilo Spike fara Honda beinleiðis eftir teimum ungu kundunum. Bilurin kemur sum 2003 modell við 5 hurðum, 7 sitiplássum og framhjólstrekk ella sum 4x4

*Kelda: FDM Motor*

## Mest økonomiski bilur 2002



Í seinastu útgávuni av FDM limablaðnum Motor bleiv Toyota Yaris kosin sum tann mest økonomiski bilur at eiga í Danmark 2002. Yaris bleiv nummar eitt av 12 bilum í sínum klassa.

*Kelda: FDM Motor*

## Berlingo/ Partner facelift



Citroën Berlingo og Peugeot Partner, ið komu á marknaðin í 1996, verða nú nakað broytir. Til dømis er instrumentborðið nýtt, nýggjur frontur og bilurin er vorðin munandi tryggari

*Kelda: FDM Motor*